

**Søk...!**

Starvið sum fíggjarleiðari á Eimskip í Føroyum er lýst at søkja.
Við beinleiðis tilvísing til stjóran, hevur fíggjarleiðarin ábyrgdina av bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýringini hjá Eimskip í Føroyum.
Dagliga arbeiðið fevnir eisini um uppgávur, ið liggja uttan fyri tað fíggjarliga og fíggjarleiðarin verður tikin uppí ráð í flest øllum spurningum, ið hava við framhaldandi menningina av felagnum at gera.

Vit bjóða
Eimskip í Føroyum er eitt ungt felag, við ungum fólki og tað gevur grøðrarlíkindi til dynamikk og ein ríkan gerandisdag. Tónalagið í felagnum er kontant, men lætt og sakligt.
Hetta er eitt spennandi starv í einum altjóða umhvørvi og fyri rætta persónin eru hópin av yrkisligum og persónligum avbjóðingum. Fíggjarleiðarin verður løntur eftir avtalu og felagið hevur eisini eftirlønarskipan.

Førleikar
Fíggjarleiðarin eigur at hava eina viðkomandi fíggjar-/búskaparliga útbúgving við royndum frá vinnulívi ella almennari fyrisiting. Góð samstarvsevni eru ein sjálvsagdur lutur og at duga at samskifta á fleiri málum vigar eisini tungt. Fíggjarleiðarin eigur at vera opin fyri nýggjum møguleikum, samstundis sum bæði beinini eru á jørðini.

Eru spurningar um starvið ella lýsingina ert tú vælkomin at ringja 347 000 og spyrja eftir Lindu B. Gunnlaugsdóttir, stjóra.

Umsókn
Umsókn, við hartilhoyrandi cv, skal vera okkum í hendi innan 21. oktober.

Umsókn skal sendast til:
Eimskip í Føroyum
Att.: Linda B. Gunnlaugsdóttir
Eystara Bryggja
Postsmoga 100
110 Tórshavn

STEFHANSSONS HÚS

EIMSKIP
www.eimskip.fo


## Minningarorð um
# Marthu Johansen

**f.22.09.60  d.07.10.02**

Týsdagin tá i boðini bórust mær at Martha ikki longur var imillum okkara vóru ógvuliga tung. Eg steðgaði á og tankar minir fóru aftur til allar tær góðu løtur, vit høvdu saman bæði á álvara og gaman.

Hjá Marthu átti kirkjan og KFUM og K eitt stórt pláss, har kom hon so trúføst. Serligan var tað kórið i KFUM og K sum hon brann fyri, og sang við tí inntil hon gjørdist sjúk.

Við sínum lætta sinni knýtti hon seg á ein serstakan hátt til ungdómin í samkomini.Hon kom við okkum á legu og var tað nakað ið tørvaðist eina hjálpandi hond, so var hon klár.

Eg búði niðri i Danmark tá ið Martha gjørdist sjúk. Eg var saman vid henni og Egili tá ið tey vóru niðri. Tað fyrsta ein legði til merkis, var hvussu sterk Martha var. Hóast at hon var ógvuligani sjúk, vildi hon altíð gleða tey, hon var saman við. Eitt nú kann nevnast tann langa tið tey vóru á sjúklinga hotel Tórshavn. Hon ynskti at troysta og gleða tey, sum har vóru. Tað varð mangan sagt við hana hvussu kanst tú vera so glað, tá ið tú sjálv ert so sjúk. Næstakærleiki hennara var stórur. Hon átti ein sterkan vitnisburð í sínum hjarta.Henda vitnisburð um sín frelsara ynskti hon at øll máttu fáa lut í.Tað eru mong, ið hava verði ríkað av henni, tí máta og kærleika sum hon um gekk tey á hotel Tórshavn uppá.

Sjúkralega hennara vardi i langa tíð, bæði við gleðiboðum og sorgarboðum, men hóast hetta var trúgv hennara sterk.

Øll kendu Marthu og vóru góð vid hana. Hetta kom til sjóndar tá ið boðini bórust týsdagin at Martha var farin, tá hvør bátur, ið lá við bryggju, dró flaggið á hálva stong.

Minnini eru mong og góð, tað rann eitt orðatak fram fyri meg: maður legst lík, men ei doyr minni mans. Minnini koma at liva víðari.

Tað var rørandi at tosa við Gerd. Tað fyrsta hon segði: »Ja nú er Martha hjá Jesusi«. Hin kristna vónin er ein vón, ið ber yvir alt. Sum kristin menniskju møtast vit ongantíð fyri seinastu ferð. Deyðin er ein skilnaður í eina tíð, og eftir tað verða vit sameind. Orðið sigur: Tí vit hava her ikki verðandi stað, men vit søkja hin komandi.Hin komandi staðurin er himmalin, har er Martha nú saman við øllum teimum, ið hava sett sítt álit a Jesus. Sangskrivarin sigur tað soleiðis:

*Ja, einaferð mítt eyga sær*
*mín kong í dýrdarskrúð;*
*og eg skal hann tilbiðja har*
*í hansar tempulbú.*
*Í krystalklárum ljósi tá skal*
*náttin brátt sín enda fá.*
*Tá loyst er hvør ein gáta*
*her,*
*og fagnarsong alt ber.*

Hjá tykkum, ið sita eftir, er saknurin stórur, eg hugsi um teg Egil, ið var henni ein so dyggur stuðul í øllum lívsins viðurskiftum. Og tykkum á Kjalarvegi og niðri á Bakka. Hon helt so nógv av tykkum.

Og børnini í familjuni vóru hennara hornasteinur, hon var so góð við tey og Gertrud tú sum var hjá henni alla tíðina og hjálpti henni so væl.

Má Guð signa og styrkja tykkum í sorgini.

Við hesum orðum lýsi eg frið yvir minnið um Marthu.

**Hanus Simonsen, Oslo**


Giktadagur
á torginum í SMS

Mánadagin 14. okt. 2002
skipar apotekið fyri giktadegi,
við í tiltakinum verða:

- Giktafelagið
- Hjálpartólamiðstøðin
- Ergo- & hjálpartól
- Tjaldurs Apotekið

Tjaldurs Apotek
Tlf. 34 11 00
www.apotek.fo








3VINIR GSM
25% bíligari

Allir GSM kundar, sum hava Vanligt hald, Vinnu hald ella GSMFritíð, kunnu nýta 3vinir tænastuna. Veljast kann frítt, um nummurini skulu vera til eina aðra GSM, til eina fastnettelefon ella til eitt nummar uttanlands.

3VINIR gevur tær møguleika at ringja bíligari til trý yndisnummur.

1. nummar -25%
2. nummar -20%
3. nummar -15%

Tú fært sendandi eitt postkort - skriva tíni trý yndisnummur, send inn, og tú ert væl áleiðis til eitt betri lív.

3VINIR umfata ikki Inmarsat, Iridium og aðrar sertænastur, sí annars www.tele.fo.

3VINIR GSM
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum